

*Føroyameistarin, Helgi Dam Ziska, stillaði upp til simultantalv í auluni í Kommunuskúlanum gjáramorgunin*

Mynd: Álvur Haraldsen

# 110 spentir næmingar í simultantalvi

**Í knappan hálvan annan tíma fyrrapartin í gjár var aulan í Kommunuskúlanum stúgvandi full av ungum, spentum næmingum, sum sluppu at royna seg í simultantalvi móti Helga Dam Ziska og Sáru Olsen**

Leo Poulsen

Aulan í Kommunuskúlanum var stúgvandi full í ein góðan tíma í morgun av spentum ungum næmingum.

Tveir rundingar a borðum vóru settir upp, og í ytra ringinum stóðu á borðunum 45 talvborð, og í tí innara 25. Innanfyri hvør sín ring gingu Helgi Dam Ziska, ungi føroyameistarin, og í tí innara 15 ára gamla Sára Traber Olsen. Hesir báðir føroysku talvúrmælingarnir skuldu so telva móti ávikavist 45 og 25 ungum og spentum telvarum. At simultantalv júst varð fyriskipað í Kommunuskúlanum er ikki so undarligt, tí rektarin, Hanus Joensen, er garvaður telvari.

– Hetta er ikki fyrstu ferð, at vit skipa fyri slíkari simultankapping. Vit halda, at hetta er ein mennandi avbjóðing hjá næmingunum, sigur Hanus Joensen.

Tað stóð øllum næmingum frítt at bjóða teimum báðum úrmælingunum av, og tað var týðiligt, at tey yngru ikki hildu seg aftur, meðan teir meiri eldru næmingarnir smæddust meira.

– Tey bæði, sum telva simultantalv móti næmingunum, hava tilknýti til skúlan. Helgi Dam Ziska hevur verið næmingur her í 10 ár, meðan Sára Olsen gongur í 9.b í Kommunuskúlanum, sigur Hanus Joensen.

## Nógv talv

Ikki øll, ið høvdu bjóðað sær til, vóru so stinn í talvi, og summi dugdu bara mannagongdina. So summi av talvunum gingu ógvuliga skjótt. Men tað gjørdi einki, kanska heldur tvørturímóti.

– 70 næmingar sleppa fram at at byrja við, men so hvørt sum eitt talv móti Helga Dam Ziska er liðugt, stendur annar næmingur klárur í røðini at sleppa fram at. Á henda hátt sluppu heilir 87 næmingar at telva móti Helga Dam Ziska, meðan Sára Olsen telvaði síni 25 talv. Tilsamans sluppu 112 næmingar at royna seg, sigur Hanus Joensen.

Upprunaliga var ein tími settur av til kappingina, men tá avtornaði hevði Helgi Dam Ziska brúkt 2,25 tímar at telva móti 87 telvarum, meðan Sára Traber Olsen brúkti 1,10 tímar móti sínum 25 telvarum.

– Tað var framman undan ikki væntandi, at nakar fór at vinna á hvørki Sáru T. Olsen og als ikki móti Helga Dam Ziska, og tað vísti seg eisini. Helgi Dam Ziska vann øll síni 87 talv, og Sára Traber Ziska síni 25. Og tað má hóast alt sigast at vera væl klárað, sigur Hanus Joensen.



*Børnini vóru spent, konsentrerað og hugalig, tá tey møttu Helga Dam Ziska og Sáru T. Olsen í simultankapping*